Viðmerkingar til Trivnaðarnevndina

Nú LM-031/2020 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.) er beint aftur í nevnd, loyvi eg mær at koma við nøkrum stuttum viðmerkingum. Tær snúgva seg um grundgevingarnar, sum alment hava verið frammi um, hví uppskotið er gott, eins væl og svarið frá Landsstýriskvinnuni uppá spurningar frá Trivnaðarnevndini dagfest 9. November í ár.

Uppskotið rakar tey við hægstu lønini

Tað er ikki satt, at hetta lógaruppskotið einamest rakar tey, sum hava hægstu lønina. Lækkingin av loftinum fyri lønarískoytinum rakar harðast tey, sum hava lægsta arbeiðsførleikan. Er arbeiðsførleikin 10%, so er tað so ræðuliga skjótt, at ein longu sum er rakar núverandi loft á 22.000 krónur, og ískoytið frá arbeiðsgevanum er tá bara onkrastaðni millum 2.200 og 4.200 krónur. Ein lækking á 2.100 krónur er tá ein sera stórur partur av lønini, og talan er ikki um høga løn.

Tað loysir seg at fáa útbúgving

Tað hevur verið borið fram, at við hesum broytingunum, so kann tað framvegis geva fíggjarliga meining, at fáa sær útbúgving.

Hetta er ikki satt hjá øllum – og ivasamt hjá teimum flestu. Skal ein t.d. fáa sær ein kandidat, so tekur hetta vanliga millum 5 og 6 ár, alt eftir hvar ein lesur. Ber ein eitt brek ella hevur størri avbjóðingar, so er tað serstakliga vanligt, at tað tekur eitt ella tvey ár longri enn ásettu tíðina. Taka vit eitt tal í lægra endanum, 6 ár, og siga at viðkomandi persónur hevði fingið eina vanliga tímalønta arbeiðsmannaløn hesi 6 árini, 21.900 krónur um mánaðin, so er talan um 1.576.800 krónur í mistari lívsinntøku. Við broytingunum hevði tað tikið einum, sum hevur 10% arbeiðsførleika og byrjar á hægsta lønarstigi hjá AKF, 57 ár at vunnið mistu inntøkuna inn aftur. Er arbeiðsførleikin 20%, ein byrjar á hægsta lønarstiganum, og ein ikki tekur hædd fyri mótrokningini í hesum lógaruppskotinum, so hevði tað tikið 20 ár.

Tískil ger hendan broytingin, at tað ikki loysir seg fíggjarliga at fáa útbúgving – og aftur her, so gongur tað harðast út yvir tey, sum hava minsta arbeiðsførleikan og harav minstu inntøkuna.

Havast skal í huga, at tímalønta arbeiðsmannalønin er brúkt í døminum her, tó at tað helst er rættast at brúka fastløntu arbeiðsmannalønina at samanbera við – eins væl og mótrokningin í hesum

lógaruppskotinum, og tað at lønin ikki byrja á endastiginum, ger, at tíðin tað tekur at vinna mistu inntøkuna innaftur í veruleikanum er væl longri. So dømini her undirmeta nógv, hvussu langa tíð tað í veruleikanum tekur.

Tímaløn heldur enn fastløn til arbeiðsmannaløn

Landsstýriskvinnan, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, vísir í sínum svarið uppá spurningar frá Trivnaðarnevndini á, at tað er rættast at brúka tímalønina heldur enn fastlønarsáttmálan hjá Føroya Arbeiðsmannafelag at samanbera við. Tímalønin fyri 40 tímar er 21.900 krónur um mánaðin, og fasta lønin er 23.200 krónur um mánaðin. At velja at brúka tímaløn at samanbera við her gevur onga meining. Soleiðis sum skipanin við tillagaðum støvum er skrúvað saman, so kann ein bara fáa fasta mánaðarløn. Tí er tað føstu mánaðarlønina ein eigur at samanbera við.

At velja at gera nakað annað enn tað, er tí fyri mær at síggja ikki annað enn ein máti at seta lønina ein samanberir við kunstiga lágt, so roknistykkið skal síggja penari út. Tískil eru roknistykkini í hoyringsskrivinum frá Michael Feldballe væl meira rættvísandi, enn tey frá Almannamálaráðnum.

Lønarískoyti er almannaveting, ikki løn

Í sama svari vísir landsstýriskvinnan á, at lønarískoyti er ein almannaveiting, ikki løn, og tískil sigur hon at lógaruppskotið ikki ger seg inn á grein 27 í ST sáttmálanum, tí parturin frá arbeiðsgevaranum fylgir sáttmálalønini og er lønin. Hetta svarið tykist at vera tilvitað misvísandi á tveimum økjum – og sær burtur frá greinini í sáttmálanum, sum mest greitt verður brotin.

Í fyrstu atløgu er tað ógvuliga greitt í bæði tekstinum í lógaruppskotinum og viðmerkingunum til lógaruppskotið frá 2016, at lønarískoytið er eitt endurgjald fyri lønarmiss. Og ikki bara tað, tað er aftur beinleiðis nevnt í lógartekstinum og lógaruppskotinum, at lønarískoytið er knýtt at sáttmálalønini. Bæði hesi viðurskiftini verða nevnd aftur og aftur í lógaruppskotinum, og tískil er tað misvísandi at bara siga, at talan ikki er um lønarmiss, tí lønarískoytið ikki er løn. Lønarískoytið er greitt knýtt at sáttmálalønini í galdandi lóg.

Harnæst sær hetta burtur frá bæði ST sáttmálananum um rættindini teirra, ið bera brek, og brekpolitikki landsins. Eins og eg og onnur fyrr hava vist á, so verður í báðum førum greitt staðfest, at tað snýr seg um at javnseta fólk, ið bera brek, við fólk, ið ikki bera brek. Tað snýr seg ikki um at geva teimum eina minstuløn ella almannaveiting, men um at tað almenna ber so í bandi, at tey fáa løn á jøvnum føti við starvsfelagar sínar. Hetta ger lógaruppskotið seg greitt inn á.

Svarið sær somuleiðis púra burtur frá §28 í brek sáttmálanum (at hava rætt til støðugt bøtt lívskor), sum ógvuliga greitt verður brotin. Hetta er átaluvert, tí greinin er beinleiðis viðkomandi í mun til spurningin Trivnaðarnevndin setti Almannamálaráðnum.

Áheitan

Eg vil at enda enn einaferð inniliga heita á tykkum um at mæla Løgtinginum til at fella hetta lógaruppskotið. Eins og fyrr víst á, so er tað ógvuliga ósannlíkt, at landskassin og føroyska samfelagið spara nakað av hesum lógaruppskotinum. Menniskjansliga sæð er uppskotið somuleiðis ómetaliga ódámligt og ilt at verja. Og at enda ber uppskotið brá av vantandi virðing fyri fólki, sum bera brek. Fólk, ið bera brek, eiga at verða javnsett við øll onnur í føroyska samfelagnum á øllum økjum, men hetta uppskotið er eitt greitt stig øvuta vegin. At bera brek er ikki eitt val, men ein lagna, sum kann raka okkum øll og okkara kæru.

Við vón um vælvild
Regin Berg, avvarandi og Master of Arts í politikki og altjóða politikki og Master í lóg